Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestargaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Broyting í kunngerð um trolveiðu innan fyri 12 fjórðingar

Spurningar:

1. Hví hevur landsstýrismaðurin broytt kunngerðina um trolveiðu innan fyri 12 fjórðingar?
2. Hvør er ítøkiliga broytingin?
3. Feløg, ið umboða útróðrarbátar, hava gjørt vart við, at broytingin í kunngerðini fer at hava avleiðingar fyri útróðurin. Er landsstýrismaðurin samdur við útróðrarfeløgunum í hesum?

Viðmerkingar:
Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ætlar at broyta kunngerðina um trolveiðu innan fyri 12 fjórðingar. Feløg, ið umboða útróðurin, hava í skrivi sagt, at skulu útróðrarbátar kappast við trolarar á innaru leiðunum, so verður ongin útróður longur. Fyri at fáa greiðu á hesum viðurskiftum verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 21. apríl 2021

Beinta Løwe Jacobsen